# LØGTINGIÐ

## TINGHÚSVEGUR 1 - 3

## GRANNSKOÐANARFRÁGREIÐING

## 2002

**FRUMRIT**

**Inngangur**
Vit hava grannskoðað tær kontur, sum eru á §1 í Landsroknskapinum fyri 2002 - roknskap løgtingsins, umsiting tess og stovnar, knýttir at løgtinginum.

Frágreiðing okkara hevur verið send leiðsluni á Løgtingsskrivstovuni, Súsonnu Danielsen, leiðsluni á Landsgrannskoðanini, Leivur Harryson og Løgtingsins umboðsmanni, Joen H. Andreassen, til ummælis. Teirra viðmerkingar eru tilskilaðar í frágreiðingini.

**Grannskoðanin**
Í samsvari við alment viðurkendar grannskoðanarmeginreglur hava vit lagt til rættis og framt grannskoðanina við atliti at fáa grundaða sannføring um, at tað ikki eru týðandi skeivleikar ella vanta týðandi upplýsingar í ársroknskapinum. Undir grannskoðanini hava vit, eftir meting um týdning og váða, kannað grundarlag og prógv fyri upphæddum og øðrum upplýsingum í ársroknskapinum. Vit hava samstundis tikið støðu til roknskaparháttin og tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt. Eisini hava vit mett um, hvørt upplýsingarnar í ársroknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin er greiddur í samsvari við tey krøv, ið føroyska lóggávan setur roknskaparhaldi, og at hann gevur rætta mynd av fíggjarligu virksemi løgtingsins fyri 2002.

## Grannskoðanin

**Alment**
Vit hava við stakroyndum eftirkannað sannanina viðvíkjandi upphæddum og upplýsingum í rakstrar-roknskapinum. Vit hava gjøgnumgingið og mett um mannagongdir og innaneftirlit, ið hava týdning fyri uppsetingina av rakstrarroknskapinum. Harumframt hava vit við stakroyndum kannað skjalatilfarið og tilhoyrandi bókingar. Vit hava við stakroyndum kannað kostnaðarskjøl, til tess at staðfesta, um skjøl eru ávíst og váttað av rætta viðkomandi, rætt bókað og annars hoyra stovninum til. Vit hava ikki viðmerkingar viðv. gjøgnumgongd okkara av kostnaðarskjølum.

Grannskoðanin av ársroknskapinum umfatar m.a. eina kanning av upphæddunum í rakstrarroknskapinum, íroknað eina samanbering við undanfarin ár og givnum játtanum.

Vit hava somuleiðis gjøgnumgingið fundarfrágreiðingar hjá formanskapinum fyri 2002 og fram til 12. januar 2004. Vit hava ongar viðmerkingar í hesum sambandi.

**Lønir v.m.**
Lønir v.m. eru nógv tann størsti útreiðsluposturin hjá løgtinginum við tilhoyrandi stovnum. Tískil hevur grannskoðanin lagt serligan dent á at kanna lønarútgjaldingarnar v.m. fyri 2002. Kanningar okkara hava tikið støði í galdandi lóggávu, sáttmálum osv.

*Tingmenn*
Viðv. tingmonnum hava vit undir grannskoðanini kannað um samsýningar, kostnaðarendurgjøld og ferða- og dagpeningur uttanlands til løgtingsmenn eru goldnar í tráð við løgtingslóg nr. 12. frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna. Eftirlønir og bíðilønir eru somuleiðis kannaðar. Samanhildið er við galdandi sáttmálar

Tingmenn verða samsýntir samsvarandi 34. lønarflokki í tænastumannalógini, íroknað vanliga viðbót. Afturat hesum verður veitt árligt kostnaðarendurgjald, svarandi til flutningskostnað 100 ferðir aftur og fram árliga, koyripeningur millum heimstað og Tórshavn 100 ferðir aftur og fram árliga, tímapening fyri 10 tímar dagliga í 100 dagar, tó fyri Suðuroyar tingmenn fullur dagpeningur í 100 dagar. Tingmenn í Tórshavn,

Hoyvík, á Argjum og Hvítanesi fáa ikki kostnaðarendurgjald. Harumframt verður veitt kostnaðarískoyti uppá kr. 2.000 um mánaðin.

Næstfomonnum Tingsins og nevndarformonnum verður veitt ein samsýning, ið er kr. 30.000 árliga, tó so um tingmaður røkir meira enn eina av hesum uppgávum, so verður bert ein samsýning veitt.

Kostnaðarendurgjaldið verður lækkað við 1/100 av kostnaðarendurgjaldinum, fyri hvønn tingdag, tingmaður ikki møtir á løgtingsfundi. Løgtingsskrivstovan ger frádráttin upp á hvørjum ári í juni mánað. Vit hava staðfest, at tær reguleringar, ið eru framdar samsvara við undirliggjandi skjøl viðv. fráveru.

Grannskoðan okkara hevur eisini umfatað ferðaforskot og ferðauppgerðir hjá tingmonnum. Veitt verður ferðaendurgjald og dag- og tímapeningur eftir reglunum, sum eru galdandi fyri tænastumenn landsins. Reglurnar eru ásettar í rundskrivi frá fíggjarmálaráðnum dagfest 9. juli 1998 um tænastuferðir uttanlands v.m. Upphæddirnar eru ásettar í vegleiðing til ferðauppgerð fyri tænastuferðir uttanlands.

Reglurnar í hesum rundskrivum verða í høvuðsheitum fylgdar, men tað kemur fyri, at serliga uttanfyri Danmark ikki ber til at fáa innivist fyri ásetta takstin. Eisini kann viðmerkjast, at verður tingmaður bjóðaður uttanlands saman við hjúnafelag, fær hjúnarfelagin dagpening og endurgjald á jøvnum føti við tingmannin.

Staðfest er, at bert í einstøkum førum verða ferða- uppgerðir ikki gjørdar upp skjótast møguligt eftir heimkomu.

Viðv. ferðaforskotum, er gomul salda uppá kr. 3.616, sum sambært løgtingsskrivstovuni er ivasamt, um møguleikar eru fyri at innheinta. Upphæddin er gomul og okkum er upplýst, at ætlanin er at avskriva upphæddina sum mista.

Ongar viðmerkingar eru annars í hesum sambandi.

**Løgtingsskrivstovan, Landsgrannskoðanin og Løgtingsins umboðsmaður**
Vit hava eisini fyri Løgtingsskrivstovuna, Landsgrannskoðanina og Løgtingsins umboðsmann kannað, um útgoldnar lønir v.m. eru samsvarandi galdandi lønarsáttmálum við avvarðandi feløg, eins og skjalprógv fyri umflokkingum, setanarskrivum v.m. eru kannað.

Víst varð á í frágreiðing okkara fyri 1999 og 2000, at av misgáum hevur vaskifólk á Løgtings-skrivstovuni fingið útgoldið góðar 11 t.kr. ov nógv í løn - viðkomandi er ikki í starvi á stovninum longur. Tað hevur verið úrslitaleyst at innheinta peningin og tískil er ætlanin at avskriva upphæddina sum endaliga mista.

Ongar viðmerkingar eru annars í hesum sambandi.

**Stuðul til parlamentariska arbeiðið**
Stuðulin verður goldin, sambært Flokskrivararareglugerð frá 25. januar 2000, við tilhoyrandi broytingum 1. mars 2000. Hvør flokkur fær grundgjald uppá 65 t.kr. Harumframt hevur hvør flokkur rætt til 35 t.kr. árliga fyri hvønn tingmann meira enn ein.

Sambært §7 í reglugerðini verður roknskapurin í hesum sambandi grannskoðaður av grannskoðara tingsins.

Stuðulin verður umsitin av Løgtingsskrivstovuni, men hvør flokkur skal tilnevna ábyrgdarpersón, sum hevur ábyrgdina fyri, at stuðulin verður umsitin, sambært reglunum.

Vit hava skjalagrannskoðað útreiðslurnar viðv. stuðli til parlamentariska arbeiðið. Skjølini vórðu góðkend og ávíst av Løgtingsskrivstovuni, men skjølini vórðu ikki í øllum førum váttað av ábyrgdarpersóni fyri viðkomandi tingbólk. Hetta er tó bert galdandi fyri telefonrokningar, sum verða sendar umsitingini beinleiðis. Hesar rokningar verða, sambært løgtingsskrivstovuni, goldnar óváttaðar, og avrit verður sent avvarðandi flokki.

Mælt verður til, at øll skjøl, viðv. floksstuðlinum, verða váttað av ábyrgdarpersóninum fyri viðkomandi tingbólk. Harvið er ongin ógreiða viðv. ábyrgd í hesum sambandi.

Grannskoðan okkara hevur staðfest, at ábyrgdarpersónar eru tilnevndir, og at flokkarnir hava gjørt ognaryvirlit, sambært reglugerðina. Vit hava við stakroyndum eftirkannað, um ognarskrásetingarnar eru rættar. Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til viðmerkingar.

Sambært reglugerðina, skal í minsta lagi helvtin av stuðlinum nýtast til skrivara/r, t.v.s umframt løn, eisini frítíðarløn, arbeiðsmarknaðargjøld v.m.

Niðanfyri standandi talva lýsir, í hvønn mun síðstnevnda treyt er lokin:

| **T.kr./flokkur** | **A** | **B** | **C** | **D** | **E** | **F** | **Tilsamans** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Umboð á tingið | 7 | 8 | 7 | 1 | 8 | 1 | 32 |
| Grundupphædd §1 | 70 | 70 | 70 | 70 | 70 | 70 | 420 |
| Tingmannaupphædd §2 | 242 | 232 | 236 | 0 | 264 | 0 | 974 |
| Stuðul tilsamans | 312 | 302 | 306 | 70 | 334 | 70 | 1.394 |
| Nýtsla 2002 | 302 | 279 | 294 | 72 | 269 | 59 | 1.275 |
| Meir/Minninýtsla | -10 | -23 | -12 | 2 | -65 | -11 | -119 |
| Lønir | 266 | 231 | 180 | 63 | 130 | 57 | 928 |
| Helvtin av stuðli til lønir: | Ja | Ja | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja |
| Helvtin av útr. til lønir: | Ja | Ja | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja |
| Max. helvtin av stuðli til annað enn lønir: | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |

Sum talvan vísir, er talan um minninýtslu samanlagt, men ikki fyri hvørja tingmanning sær. Samanlagt fyri allar flokkarnar er tó ein minninýtsla á 119 t.kr. Treytin um, at minst helvtin av stuðlinum skal verða nýttur til lønir er ikki lokin viðv. Tjóðveldisflokkinum. Myndin broytist ikki, um treytin verður roknað í mun til útreiðslurnar, ístaðin fyri eftir tillutaðum stuðli.

Spurningurin er um ásetingin um, at minst helvtin av stuðlinum skal verða nýttur til lønir er nóg greitt orðað. Men sambært Løgtingsskrivstovuni, hevur formansskapurin tulkað ásetingina soleiðis, at í mesta lagi helvtin av stuðlinum kann brúkast til annað enn til lønir. Fyri 2002 lúka allir flokkar, hesa áseting einsæris og samanlagt.

Vit vilja enn einaferð heita á formansskapin um at taka støðu til, um roknskaparligu upphæddirnar fyri hvørja tingmanning sær eiga at verða váttaðar av ábyrgdarhavandi, tá roknskaparskeiðið er lokið.

**Bygging**
Í 2000 er virksemið av álvara farið í gongd at umbyggja Løgtingshúsið. Í frágreiðing okkara fyri 2000 mæltu vit til, at byggiroknskapur verður uppsettur, soleiðis at formansskapurin ávegis kann fylgja við, um kostnaðurin heldur samanborið við løgdu ætlanirnar. Sjálvstøðugur byggiroknskapur er ikki gjørdur fyri 2002, men, sambært umsitingini, verður byggiroknskapur gjørdur, tá byggingin er liðug.

**Setanarskriv hjá Tinglimum**
Lóggávan ásetur, at løgtingsmaður, sum er í almennum starvi í mesta lagi kann starvast 50% av tíðini í hesum starvi, meðan hann er løgtingsmaður ella varamaður fyri løgtingsmann. Vit hava kannað, um skjalprógv fyriliggur frá arbeiðsgevarum, ið koma undir hesa reglu, sum kom í gildi pr. 1. august 1999.

Okkum er upplýst, at viðurskiftini hjá Jenisi av Rana og Marjusi Dam, framvegis ikki eru komin í rættlag. Málið er enn til viðgerðar hjá formansskapinum, uttan at endalig niðurstøða er gjørd. Støðan er óheppin, tí viðkomandi hava ikki lokið treytirnar í lóggávuni í meira enn 4 ár.

Spurningurin er, um reglurnar sum heild eru nøktandi. Lógarkravið viðv. starvsumráði v.m. er greitt, men hinvegin vanta greiðir sanktiónsmøguleikar, tá tingmaður ikki lýkur treytirnar.

Heitt verður enn einaferð á formansskapin, um at fáa hesi viðurskifti í rættlag sum skjótast.

**Góðkenning av roknskapi**
Í frágreiðing okkara fyri 1999 og 2000 varð heitt á formansskapin um, í sambandi við roknskapir, at innføra váttanarmannagongd fyri Landsgrannskoðanina og Løgtingsskrivstovuna. Málið er ikki avgreitt, men okkum upplýst verður arbeitt við hesum, soleiðis at mannagongdin harumframt kemur at fevna um Løgtingsins Umboðsmann.

**Grannskoðanarfrágreiðing 2001**
Vit hava kannað og staðfest, at formansskapurin hevur viðgjørt og góðtikið grannskoðanarfrágreiðingina fyri 2001.

## Upplýsingar viðv. Roknskapinum

Roknskapur løgtingsins við tilhoyrandi stovnum er settur upp í Landskassaroknskapinum fyri 2002.

Niðanfyri eru høvuðskontur á §1 settar upp. Yvirlitið vísir nýtslu og játtan fyri 2002. Upphæddirnar fyri 2001 eru somuleiðis vístar (t.kr.).

| | SKJAL | t.kr. 2002 | t.kr. Játtan | t.kr. 2001 |
|---|---|---|---|---|
| **Løgtingið** | | | | |
| Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn | | 3.381 | 3.386 | 1.141 |
| Løgtingsarbeiði | | | | |
| Løgtingsmenn | | 15.153 | 16.410 | 14.889 |
| Stuðul til parlamentariska arbeiðið | | 1.278 | 1.400 | 1.216 |
| Eftirlitsuppgávur | | 309 | 500 | -28 |
| Fyrisiting løgtingsins | | 5.362 | 5.581 | 5.415 |
| Løgtingsarbeiði tilsamans | A | 22.103 | 23.891 | 21.493 |
| Nýggjur bygningur til Føroya Løgting | | 21.561 | 22.400 | 11.048 |
| | | **47.044** | **49.677** | **33.682** |
| **Stovnar, knýttir at løgtinginum** | | | | |
| Landsgrannskoðanin | B | 3.860 | 4.426 | 3.668 |
| Løgtingsins umboðsmaður | C | 1.717 | 2.114 | 1.657 |
| | | **5.577** | **6.540** | **5.326** |
| **Útreiðslur, løgtingið tilsamans** | | **52.621** | **56.217** | **39.007** |

Niðanfyri hava vit gjørt viðmerkingar til útvaldar høvðuskontur í mun játtanir og í mun til 2002. Viðmerkjast skal, at sambært játtanarskipanina, skulu játtanir haldast á høvuðskontustigi, og somuleiðis skulu lønarjáttanir haldast. Hinvegin kunnu frávik verða á standardkontum - undirkontur til høvuðskontur - í mun til tær ætlanir, stovnurin upprunaliga hevði.

**Samlaði raksturin**
Samanumtikið vísir roknskapurin fyri 2002, at talan er um eina minninýtslu í mun til játtan á øllum høvuðskontum. Útreiðslurnar eru samanlagt 52,6 mió.kr., meðan játtanin er uppá 55,8 mió.kr. Útreiðslurnar eru øktar samanlagt við 13,6 mió.kr. í mun til 2001.

**Løgtingsmenn**
Niðanfyri er høvuðskontan løgtingsmenn nærri útgreinað til tess at lýsa útreiðslurnar í mun til 2001 og í mun til ætlan fyri 2002 (t.kr.):

| | 2002 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2001 | Munur 2001-02 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 11.855 | 12.230 | -375 | 11.682 | 173 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.315 | 2.060 | -745 | 1.162 | 153 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 1 | 0 | 1 | 4 | -3 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 1.757 | 1.870 | -113 | 1.816 | -58 |
| Tilskot til útlandið | 225 | 250 | -25 | 225 | 0 |
| Innanh. flytingar | 1 | 0 | 1 | 1 | 0 |
| | **15.153** | **16.410** | **-1.257** | **14.889** | **264** |

Talan er um eina minninýtslu viðv. lønum v.m. uppá 375 t.kr. og eina minninýtslu viðv. keyp av vørum og tænastum uppá 745 t.kr. Samanlagt er talan um eina minninýtslu í mun til játtan uppá 1.257 t.kr., meðan útreiðslurnar eru 264 t.kr. hægri enn í 2001.

**Stuðul til parlamentariska arbeiðið**

| | 2002 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2001 | Munur 2001-02 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 928 | 1.000 | -72 | 875 | 53 |
| Keyp av vørum og tænastum | 291 | 200 | 91 | 206 | 85 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 60 | 200 | -140 | 130 | -71 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 0 | 0 | 0 | 5 | -5 |
| Annað | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | **1.278** | **1.400** | **-122** | **1.216** | **63** |

Talan er um eina minninýtslu viðv. lønum uppá 72 t.kr. Hinvegin er talan um eina meirnýtslu uppá 91 t.kr. viðv. keyp av vørum og tænastum og eina minninýtslu uppá 140 t.kr. viðv. keyp av útbúnaði. Samanlagt er talan um eina minninýtslu uppá 122 t.kr. í mun til játtan. Kostnaðurin er 62 t.kr. hægri í 2002 enn í 2001.

**Fyrisiting løgtingsins (Løgtingsskrivstovan)**
Niðanfyri er høvuðskontan løgtingsskrivstovan nærri útgreinað til tess at lýsa útreiðslurnar í mun til 2001 og í mun til ætlan fyri 2002 (t.kr.):

| | 2002 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2001 | Munur 2001-02 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 3.738 | 3.750 | -12 | 3.426 | 312 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.192 | 1.531 | -339 | 1.437 | -245 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 20 | 0 | 20 | 85 | -65 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 417 | 300 | 117 | 456 | -38 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 4 | 0 | 4 | 4 | 0 |
| Søla av vørum og tænastum | -10 | 0 | -10 | -6 | -4 |
| Innanh. flytingar | 0 | 0 | 0 | 13 | -13 |
| | **5.362** | **5.581** | **-219** | **5.415** | **-53** |

Útgreiningin vísir, at útreiðslurnar eru 53 t.kr. lægri í 2002 enn í 2001. Størsta lækkingin er innan keyp av vørum og tænastum. Kostnaðurin til leigu og viðlíkhald er lækkaður nakað ímun til 2001, hóast hetta er hesin posturin 117 t.kr. hægri enn játtan. Samanlagt er talan um eina minninýtslu á 219 t.kr., og kostnaðurin er 53 t.kr. minni enn í 2001.

Í skjali A, eru omanfyri standandi útreiðslur nærri útgreinaðar.

**Landsgrannskoðanin**
Niðanfyri er høvuðskontan landsgrannskoðanin nærri útgreinað til tess at lýsa útreiðslurnar í mun til 2001 og í mun til ætlan fyri 2002 (t.kr.):

| | 2002 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2001 | Munur 2001-02 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 2.937 | 3.566 | -629 | 2.850 | 87 |
| Keyp av vørum og tænastum | 565 | 380 | 185 | 546 | 18 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 118 | 170 | -52 | 118 | 0 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 195 | 190 | 5 | 226 | -31 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 2 | 0 | 2 | 2 | 0 |
| Innanh. flytingar | 0 | 0 | 0 | -117 | 117 |
| Løgtingsgrannskoðararnir | 42 | 120 | -78 | 42 | 0 |
| | **3.860** | **4.426** | **-566** | **3.668** | **192** |

Sambært útgreiningini viðv. landsgrannskoðanini er talan um hækkingar á lønarøkinum - uppá 87 t.kr. í mun til 2001. Men í mun til lønarkarmin er talan um eina minninýtslu uppá 629 t.kr. á lønarøkinum. Útreiðslurnar til keyp av vørum og tænastum eru hækkaðar við 18 t.kr. í mun til 2001 - men frávikið í mun til ætlan er uppá 185 t.kr. Samanlagt hevur stovnurin eina minninýtslu uppá 566 t.kr. í 2002. Útreiðslurnar eru hækkaðar við 192 t.kr. í mun til 2001.

Í skjali B, eru omanfyri standandi útreiðslur nærri útgreinaðar.

**Løgtingsins umboðsmaður**
Niðanfyri er høvuðskontan Løgtingsins umboðsmaður nærri útgreinað til tess at lýsa útreiðslurnar í mun til 2001 og í mun til ætlan fyri 2002 (t.kr.):

| | 2002 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2001 | Munur 2002-01 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 1.278 | 1.414 | -136 | 768 | 510 |
| Keyp av vørum og tænastum | 335 | 200 | 135 | 309 | 26 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 48 | 0 | 48 | 519 | -470 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 56 | 100 | -44 | 62 | -6 |
| Innanh. flytingar | -1 | 0 | -1 | 0 | -1 |
| | **1.717** | **1.714** | **3** | **1.657** | **59** |

Virksemið hjá stovninum er byrjað í mars mánað 2001. Í mun til æltanina er talan um eina minninnýtslu uppá 4 t.kr. Størsta minninýtslan er innan lønarøkið - minninýtslan er uppá 136 t.kr. Meirnýtsla er uppá 135 t.kr. viðv. keypi av vørum og tænastum.

Í skjali C, eru omanfyri standandi útreiðslur nærri útgreinaðar.

**Grannskoðaraváttan**
Vit skulu vátta, at vit lúka lógarinnar habilitetstreytir, og at vit undir grannskoðanini hava fingið allar tær upplýsingar, vit hava biðið um.

Tórshavn, hin 12. januar 2004

**P/F Grannskoðaravirkið *INPACT***
statsaut. revisorar

Jógvan Amonsson Óli Joensen
statsaut. revisor

**Undirritaðu vátta hervið at hava lisið grannskoðanarfrágreiðingina, hin ___ / ___ - 2004.**

| Edmund Joensen | Hergeir Nielsen | Vilhelm Johannesen | Óli Breckmann |
|---|---|---|---|
| formaður | 1. næstform. | 2. næstform. | 3. næstform. |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI

| Løgtingsmenn | t.kr. 2002 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2001 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 10.582 | | 10.360 |
| Tænstumenn | 556 | | 537 |
| Tímalønt | 0 | | 0 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 469 | | 546 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 248 | | 239 |
| **Lønir v.m.** | **11.855** | **12.230** | **11.682** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 14 | | 111 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 567 | | 965 |
| Ferðing og flutningur, onnur | 0 | | 0 |
| Umboðan | 244 | | 47 |
| Matur og drykkjuvørur | 8 | | 24 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 0 | | 0 |
| Keyp av vørum annars | 6 | | 1 |
| Telefon | 0 | | 0 |
| Trygging | 0 | | 0 |
| Keyp av tænstum í sambandi við edv- og kunningartøkni | 0 | | 6 |
| Grannskoðanar-, roknskapar- og løgfrøðiligar tænastur | 0 | | 0 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 474 | | 8 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **1.315** | **2.060** | **1.162** |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 0 | | 0 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **0** | **0** | **0** |
| Húsaleiga | 1 | | 4 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar | 0 | | 0 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **1** | **0** | **4** |
| Útreiðslugreiddar veitingar | 1.757 | | 1.815 |
| Kassa-, kursmunir o.a. | 0 | | 1 |
| **Ymsar rakstrarútreiðslur** | **1.757** | **1.870** | **1.816** |
| Altjóða felagsskapir | 225 | | 225 |
| **Tilskot til útlandið** | **225** | **250** | **225** |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr. | 1 | | 1 |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr.** | **1** | **0** | **1** |
| Keyps- mvg | 0 | | 0 |
| **Keyps- mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **Løgtingsmenn tilsamans** | **15.153** | **16.410** | **14.889** |

| Stuðul til parlamentariska arbeiði | t.kr. 2002 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2001 |
|---|---|---|---|
| Tímalønt | 1 | | 0 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 861 | | 791 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 21 | | 16 |
| Eftirlønir | 45 | | 68 |
| **Lønir v.m.** | **928** | **1.000** | **875** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 0 | | 0 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 5 | | 0 |
| Orkukeyp - el | 0 | | 0 |
| Umboðan | 1 | | 0 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 3 | | 4 |
| Keyp av vørum annars | 98 | | 79 |
| Telefon | 68 | | 71 |
| Postgjøld | 1 | | 0 |
| Tryggingar | 0 | | 0 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv og kunningartøkni | 24 | | 7 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 90 | | 44 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **291** | **200** | **206** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 6 | | 35 |
| Skrivstovuútbúnaður | 33 | | 56 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 20 | | 40 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **60** | **200** | **130** |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar | 0 | | 5 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **0** | **0** | **5** |
| Vørusøla til privat | 0 | | 0 |
| **Søla av vørum og tænastum** | **0** | **0** | **0** |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr. | 0 | | 0 |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr.** | **0** | **0** | **0** |
| **Stuðul til parlamentariska arbeiði - tilsamans** | **1.278** | **1.400** | **1.216** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI - framhald

| Eftirlitsuppgávur | t.kr. 2002 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2001 |
|---|---|---|---|
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 0 | | 0 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 0 | | 0 |
| **Lønir v.m.** | **0** | **0** | **0** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 0 | | 0 |
| Ferðing og flutningur, onnur | 0 | | 0 |
| Keyp av vørum annars | 0 | | 0 |
| Postgjøld | 0 | | 0 |
| Grannskoðanar-, roknskapa- og løgfrøðiligar tænastur | 0 | | 0 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 309 | | -25 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **309** | **500** | **-25** |
| Vørusøla til privat | 0 | | -3 |
| **Søla av vørum og tænastum** | **0** | **0** | **-3** |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr. | 0 | | 0 |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr.** | **0** | **0** | **0** |
| **Eftirlitsuppgávur - tilsamans** | **309** | **500** | **-28** |

| Fyrisiting løgtingsins | t.kr. 2002 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2001 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 2.603 | | 2.340 |
| Tænastumenn | 565 | | 539 |
| Tímalønt | 302 | | 409 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 9 | | 16 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 74 | | 68 |
| Eftirlønir | 262 | | 208 |
| Endurgjald í sambandi við lønir | -78 | | -155 |
| **Lønir v.m.** | **3.738** | **3.750** | **3.426** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 0 | | 1 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 56 | | 0 |
| Umboðan | 39 | | 22 |
| Matur og drykkjuvørur | 2 | | 2 |
| Orkukeyp - el | 105 | | 59 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 148 | | 81 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 19 | | 532 |
| Keyp av vørum annars | 130 | | 123 |
| Telefon | 139 | | 153 |
| Postgjøld | 13 | | 11 |
| Trygging | 34 | | 44 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv- og kunningartøkni | 237 | | 212 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 270 | | 197 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **1.192** | **1.531** | **1.437** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI - framhald

| Fyrisiting løgtingsins | t.kr. 2002 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2001 |
|---|---|---|---|
| Telduútbúnaður og edv-menning | 20 | | 45 |
| Skrivstovuútbúnaður | 0 | | 40 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 0 | | 7 |
| Søla av brúktum skrivstovuútb. | 0 | | -7 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **20** | **0** | **85** |
| Húsaleiga | 360 | | 413 |
| Langtíðarleiga og leiga annars | 0 | | 0 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar | 57 | | 43 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur av maskinum v.m. | 0 | | 0 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **417** | **300** | **456** |
| Rakstraravskrivingar | 0 | | 0 |
| **Avskrivingar o.a.** | **0** | **0** | **0** |
| Útreiðslugreiddar veitingar | 4 | | 4 |
| Kassa-, kursmunir o.a. | 0 | | 0 |
| **Ymsar rakstrarútreiðslur** | **4** | **0** | **4** |
| Vørusøla til privat | -10 | | -6 |
| Vørusøla til almennar stovnar, virksemi og verkætlanir | 0 | | 0 |
| **Søla av vørum og tænastum** | **-10** | **0** | **-6** |
| Toll- og nýtslugjøld | 0 | | 0 |
| **Skattur og avgjøld** | **0** | **0** | **0** |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr. | 0 | | 13 |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr.** | **0** | **0** | **13** |
| Keyps-mvg | 0 | | 0 |
| **Keyps- mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **Fyrisiting løgtingsins tilsamans** | **5.362** | **5.581** | **5.415** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **LØGTINGSARBEIÐI TILSAMANS** | **22.103** | **23.891** | **21.493** |

## SKJAL B: LANDSGRANNSKOÐANIN

| Vanligt virksemi | t.kr. 2002 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2001 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 1.688 | | 1.618 |
| Tænastumenn | 939 | | 878 |
| Tímalønt | 78 | | 72 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 8 | | 80 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 58 | | 54 |
| Eftirlønir | 167 | | 148 |
| **Lønir v.m.** | **2.937** | **3.566** | **2.850** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 38 | | 33 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 73 | | 72 |
| Ferðing og flutningur, onnur | 3 | | 33 |
| Umboðan | 117 | | 4 |
| Orkukeyp - el | 14 | | 14 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 7 | | 8 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 9 | | 13 |
| Keyp av vørum annars | 62 | | 78 |
| Telefon | 30 | | 20 |
| Postgjøld | 5 | | 4 |
| Grannskoðanar-, roknskapar- og løgfrøðiligar tænastur | 0 | | 116 |
| Trygging | 5 | | 8 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv- og kunningartøkni | 23 | | 32 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 178 | | 111 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **565** | **380** | **546** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 86 | | 44 |
| Skrivstovuútbúnaður | 0 | | 4 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 32 | | 71 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **118** | **170** | **118** |
| Húsaleiga | 190 | | 190 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar | 4 | | 33 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur av maskinum v.m. | 0 | | 2 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **195** | **190** | **226** |
| Útreiðslugreiddar veitingar | 2 | | 2 |
| **Ymsar rakstrarútreiðslur** | **2** | **0** | **2** |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr. | 0 | | 0 |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr.** | **0** | **0** | **0** |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - innt. | 0 | | -117 |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - innt.** | **0** | **0** | **-117** |
| Keyps-mvg | 0 | | 0 |
| **Keyps- mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **Vanligt virksemi tilsamans** | **3.818** | **4.306** | **3.626** |

## SKJAL B: LANDSGRANNSKOÐANIN - framhald

| Vanligt virksemi | t.kr. 2002 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2001 |
|---|---|---|---|
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 42 | | 41 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 1 | | 1 |
| | **42** | **120** | **42** |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr. | 0 | | 0 |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr.** | **0** | **0** | **0** |
| **Løgtingsgrannskoðararnir tilsamans** | **42** | **120** | **42** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **LANDSGRANNSKOÐANIN TILSAMANS** | **3.860** | **4.426** | **3.668** |

## SKJAL C: LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

| Vanligt virksemi | t.kr. 2002 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2001 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 580 | | 338 |
| Tænastumenn | 563 | | 349 |
| Tímalønt | 44 | | 32 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 23 | | 10 |
| Eftirlønir | 69 | | 38 |
| **Lønir v.m.** | **1.278** | **1.414** | **768** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 87 | | 85 |
| Umboðan | 1 | | 5 |
| Orkukeyp - el | 3 | | 2 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 5 | | 4 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 2 | | 15 |
| Keyp av vørum annars | 24 | | 44 |
| Telefon | 30 | | 22 |
| Postgjøld | 7 | | 2 |
| Trygging | 2 | | 8 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv og kunningartøkni | 56 | | 82 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 117 | | 39 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **335** | **200** | **309** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 7 | | 436 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 41 | | 83 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **48** | **0** | **519** |
| Húsaleiga | 56 | | 47 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar | 0 | | 15 |
| Skattur, avgjøld o.t. | 0 | | 0 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **56** | **100** | **62** |
| **Ymsar rakstrarútreiðslur** | **0** | **400** | **0** |
| Søla av vørum og tænastum | -1 | **0** | 0 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr. | 0 | | 0 |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr.** | **0** | **0** | **0** |
| **LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR TILSAMANS** | **1.717** | **2.114** | **1.657** |

## SKJAL D: EFTIRLØN OG BÍÐILØN TIL LØGTINGSMENN

| Útreiðslur | t.kr. 2002 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2001 |
|---|---|---|---|
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 28 | | 1 |
| **Lønir v.m.** | **28** | **0** | **1** |
| Tænastumannaeftirlønir | 3.352 | | 1.140 |
| **Tilskot til einstaklingar** | **3.352** | **3.386** | **1.140** |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr. | 0 | | 0 |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr.** | **0** | **0** | **0** |
| **EFTIRLØN OG BIÐILØN TIL LØGTINGSMENN TILSAMANS** | **3.381** | **3.386** | **1.141** |

## SKJAL E: NÝGGJUR BYGNINGUR TIL FØROYA LØGTINGS

| Útreiðslur | t.kr. 2002 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2001 |
|---|---|---|---|
| **Lønir v.m.** | **0** | **0** | 0 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 29 | | 7 |
| Keyp av vørum annars | 2 | | 8 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 12 | | 53 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **42** | **0** | **68** |
| Húsaleiga | 0 | | 1 |
| **Leiga. Viðlíkahald og skattur** | **0** | **0** | **1** |
| Frádráttur fyri løguløn | 0 | | 0 |
| Frádráttur fyri ferðaútreiðslur | -29 | | -7 |
| **Ymsar rakstrarútreiðslur** | **-29** | **0** | **-7** |
| Bygningar, privat | 21.547 | | 10.985 |
| **Bygging og løguframleiðsla** | **21.547** | **22.400** | **10.985** |
| **Skattur og avgjøld** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum stovn. - útr.** | **0** | **0** | **0** |
| Keyps-mvg | 0 | | 0 |
| **Keyps-mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **NYGGJUR BYGNINGUR TIL FØROYA LØGTINGS** | **21.561** | **22.400** | **11.048** |